# Sosialráðgevi

## til Stuðulsskipanina fyri vaksin

Eitt starv sum sosialráðgevi á Stuðulsskipanini fyri vaksin, undir Heimarøktini og Serforsorgini, verður hervið lýst leyst til setan sum skjótast ella eftir nærri avtalu.

Stuðulsskipanin fyri vaksin fevnir um stuðul til 97 heimabúgvandi brúkarar, svarandi til 40 fulltíðarstørv.

**Starvsuppgávur**
- At ráðgeva og vegleiða
- Samskipa stuðulin, tá fleiri stovnar eru inni í myndini
- Viðgera nýggjar umsóknir
- Ráðgeva feløg og stovnar
- Endurmeta ta hjálp sum er veitt einum brúkara

**Vit søkja eftir einum starvsfólki, ið:**
- Hevur vitan og royndir innan sosiala øki
- Hevur áhuga at arbeiða við brekaðum
- Dugir at skapa positivt og virðiligt samband við brúkaran
- Dugir at arbeiða skipað og miðvíst
- Dámar at arbeiða bæði sjálvstøðugt og tvørfakliga
- Er sálarliga væl fyri og dámar avbjóðingar
- Er uppfinningarsamur og dugir at umstilla seg skjótt

**Vit bjóða**
- Eitt mennandi arbeiði, har nógv er at gera
- Eitt arbeiðsumhvørvi har pláss er fyri látri
- Vegleiðing
- Supervisión

**Setanar- og lønarviðurskifti:**
Løn- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráði og Starvsmannafelagið. Setanarøkið fevnir um Heimarøktina og Serforsorgina. Tænastustaðurin í løtuni er Stuðulsskipanin fyri vaksin.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Stuðulsskipanina á tlf. 354020 og tosa við Regin Johansen ella við sosialráðgevi Odu M. Jóhansdóttir.

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn, við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu sendast til:

**Stuðulsskipanin fyri vaksin**
Att.: Regin Johansen
Løkjatún 1
160 Argir

**Umsóknarfreist: 24. januar 2005**

# Bilmekanikari

Søkt verður eftir bilmekanikara at byrja sum skjótast.

Áhugað kunnu venda sær til Heðin ella Finnboga.

**Pf. Meinhardt Arge**
**Tlf. 345400**

**Landssjúkrahúsið**
FO 100 Tórshavn

# Húsavørður

Starvið sum húsavørður á Landssjúkrahúsinum er leyst at søkja til setan skjótast gjørligt.

Húsavørðurin hevur við tilvísing til depilsleiðaran á Tænastudeplinum dagligu leiðsluna av fýra starvsfólkum. Húsavørðurin skal verða við til at menna samskiftið og tænastustøðið á Landssjúkrahúsinum.

**Arbeiðið umfatar m.a.:**
- umsiting av íbúðum og innbúgvi
- innan- og uttandura flutningi av pakkum, innbúgvi o.a.
- fyriskipan av hølum í smb. við skeið og annað ítriv
- innanhýsis koyring av matvørum, klæðum o.a.
- umsiting av uttandura øki hjá sjúkrahúsinum

**Førleikakrøv:**
- leiðsluroyndir
- stóra koyrikortið
- tænastulyndi
- edv-kunnleiki á brúkarastøði
- fleksibul í arbeiðstíðum
- luttøka í vaktarskipan, um neyðugt

**Eginleikar:**
- góður røkjuskapur
- góð samstarvsevni
- positiv/ur við tænastusinni

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið, flokkur 4.

**Upplýsingar um starvið**
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jan á Argjaboða, leiðara á Tænastudeplinum, telefon 30 45 00, lokal 1021 ella e-post jaa@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 21. januar 2005 kl. 12.00.

**Skrivlig umsókn**, merkt "umsókn til starv" við avriti av prógvum, CV og viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna "starvsfólk"*


# Toyota - dele

brugte og nye

Vi sender hver dag til Færøerne

Sosialurin 341800

AABENRAA AUTOGENBRUG
TEL (+45) 74 61 41 10
FAX (+45) 74 61 41 64
www.dkauto.dk · salg@dkauto.dk


# Skopunar Kommuna

**Føstu almennu kommunustýrisfundirnir í 2005 verða:**

| | |
|---|---|
| 27. januar | 24. februar |
| 31. mars | 21. apríl |
| 26. mai | 16. juni |
| 11. august | 22. september |
| 27. oktober | 24. november |
| 15. desember | |

Allir fundirnir eru ásettir at verða kl. 19.00.

Kunngjørt verður um møguliga avlýstar fundir ella broytingar.

*Skopun, 04. januar 2004*

**Skopunar Kommuna**

# Berg Hesta Cup

Stuttleikakapping fyri íslandsross verður í høllini hjá Berg Hestum leygardagin 8.1. 2005 kl. 15.00.

Kappast verður í fet – spakuligt tølt – trav – øltølt. Luttøkugjald 50 kr.

**Tilm. tlf. 316896 · 226211 · 222906**




Sosialurin
www.sosialurin.fo


Søkt verður eftir

# Kranaførara

at byrja skjótast gjørligt.

**Førleikakrøv:** Kranaloyvi A (tornkrani).

**P/F BYGGITEK**
**Stiðjagøta 3, Tórshavn, tlf. 317585**

# Bahá'i Miðstøðin

## Opið hús

fríggjadagin 7. janaur 2005 kl. 20.00.
Øll eru vælkomin.

Hjarta títt er heim mítt;
halga tað til niðurkomu mína.
Andi tín er mítt opinberingarstað;
reinska hann til sjónliggerð mína.
Bahá'u'lláh